# INN skal altíð hava vøruna

Slagorðið hjá teimum trimum INN-handlunum í Føroyum er, at handilin skal altíð hava vøruna.

Tann fyrsti INN-handilin lat upp við Norðskála, og síðani eru handlarnir í Klaksvík og í Havn komnir afturat. Hadilin við Norðskála bleiv bygdur í 2002. Bygningurin er á Svartheyggi beint norðan fyri brúnna við Streymin. Hann er umleið 700 fermetrar stórur, og tað mesta er handilshøli.

Handilin í Havn er í gamla handlinum hjá Eli við Landavegin, og í Klaksvík húsast INN í nýggjum handilshølum á vestara armi.

Jaspur Johannesen, stjóri, sigur, at INN-handlarnir leggja dent á at hava ta vøru, sum kundin vil hava. Allir tríggir handlarnir eru stórir og rúmligir, og dentur verður lagdur á at hava eitt stórt og breitt vøruúrval. Harafturat leggja handlarnir dent á at hava dygdarprísir, sigur Jaspur Johannesen.

Meðan flestu handlar fegnast um stóra sølu í jólamánaðinum, merkist tað ikki so væl í matvøruhandlunum, at jólini eru í hondum. Jaspur Johannesen sigur, at sølan hjá einum matvøruhandli er rættiliga jøvn ígjøgnum alt árið, men at tey kortini merkja eitt lítið lop, tá jólini nærkast.

Sjálvur er Jaspur Johannesen leiðari í handlunum í Havn og við Norðskála, meðan Jóhanna Christiansen stendur fyri dagliga rakstrinum í handlinum í Klaksvík.




























